**Ískoytisavtala frá 1. desember 1999 til sáttmála frá 23. september 1996 og protokol frá 6. oktober 1997 millum tey norðurlendsku londini at sleppa undan tvískatting, hvat viðvíkur inntøku- og ognarskattum**

Sáttmálin frá 23. september 1996 millum tey norðurlendsku londini at sleppa undan tvískatting og tilhoyrandi protokol frá 6. oktober 1997 eru við heimild í grein 30, stk. 1 í sáttmálanum við boðskrivum millum hesi lond, seinast við boðskrivi frá Finnlandi, dagfest 1. desember 1999, víðkað til eisini at fevna um "landsskabet" Åland, eisini hvat viðvíkur finska kommunuskattinum.

Tann finski kommunuskatturin er ikki uppíroknaður virkisøki sáttmálans sambært grein 3, stk. 1, litra a. Víðkanin hevur gildi frá somu dagfesting sum tvískattasáttmálin og protokollin, t.e. frá 1. januar 1998.